


*Gøtumenn vunnu 2-0 í Vági*

# Kasper Schultz verður ikki við

**VODAFONEDEILDIN** FC Suðuroy hugsar ikki stórvegis um dystin í gjár. Nú ræður bara um at vinna móti AB leygardagin, og tað verður uttan Kasper Schultz

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| FC Suðuroy | 0 |
| Víkingur | 2 |

**Kasper verður ikki við í lagnudystinum á Argjum leygardagin. FC Suðuroy er eitt stig aftan fyri B71 undan seinasta dystinum**

Kasper Schultz varð útvístur miðskeiðis í seinna hálvleiki, tá Víkingur vitjaði í Vági í gjár.

Danski miðverjin fekk fyrst gult kort, tá hann framdi fríspark. Síðan segði hann okkurt, sum ikki hóvaði Ransin N. Djurhuus, sum gav honum seinna gula kortið.

Schultz hevur staðið seg væl, síðan hann flutti til FC Suðuroy í summarsteðginum. Hann verður ikki við í lagnudystinum á Argjum leygardagin. FC Suðuroy er eitt stig aftan fyri B71 undan seinasta dystinum.

Víkingur greiddi sína skyldu móti botnliðnum í gjár. Víkingur hevur tí møguleikan at røkka triðja plássinum.

Úrslitið var 2-0. Bæði málini komu eftir deyðbóltsstøður. Finnur Justinussen legði gestirnar á odda, tá hann stýrdi frísparksinnleggi í máli. Hans Jørgen Djurhuus økti í seinna hálvleiki, tá hann stýrdi hornasparksinnleggið í netið.

*uni@sosialurin.fo*



# KÍ-unglingar føroya-meistarar

Fótbóltskappingin hjá unglingum er liðug, og har gjørdist KÍ føroyameistari. KÍ var væl frammanfyri hini liðini móti endanum av kappingini, og longu í fjórðseinasta umfari var føroyameistaraheitið tryggjað. KÍ endaði átta stig frammanfyri B36, sum vann silvur. NSÍ vann bronsu. Fleiri av spælarunum á KÍ-liðnum hava eisini spælt á 1. deildarliðnum hjá felagnum, sum hevur tryggjað sær uppflyting til bestu deildina.

*-uni*



# Panic hevur skrivað undir

Jovan Radinovic-Panic spælir eisini við 07 Vestur, tá liðið skal royna seg í Vodafonedeildini í næsta ár. Serbiski miðvallarin skrivaði undir í vikuni.

Tað skrivar heimasíðan hjá vágamonnum.

Avtalan bindir Panic at felagnum komandi tvey árini.

Jovan Radinovic Panic hevur spælt við 07 Vestur seinastu fýra árini. Hann hevur spælt 85 dystir og skotið 38 mál fyri felagið. Hann spældi bara tveir dystir í Vodafondeildini í fjør, vegna skaða, skrivar heimasíðan há 07 Vestur.

*- uni*